# Enn er einki avgjørt

*Her er Bartal Eliasen oman fyri John Petersen, men eftir dystin sunnudagin er B36 oman fyri GÍ á stigatalvuni*

*Mynd: Jonhard Hammer*



**Sigurin hjá B36 á GÍ viðførdi, at oddastríðið nú er víðopið. Eitt oddastríð, sum eisini verður avgerandi fyri lagnuna hjá bronsuvinnarunum**

SAMANUM

*Jákup Mørk*

Stórdysturin hetta vikuskiftið var sjálvsagt í Gundadali, har tey bæði liðini, sum fullkomuliga hava dominerað kappingarárið hittust.

Sum tað framgongur aðra staðni á hesum síðum, so gjørdist úrslitið ein 3-1 sigur til B36, og sum liðið spælir í løtuni, eru tað helst fleiri, sum hava ilt við at ímynda sær nakran annan meistara.

## Eru favorittar

Teir í B36 mugu eisini ásanna, at teir í skrivandu løtu eru favorittar til FM-gullið, men hinvegin skal tó ikki so øgiligt hugflog til, fyri at ímynda sær gøtumenn sum meistarar. Hóast úrslitini ikki hava verið heilt eftir vild síðani summarsteðgin, so sýndu gøtumenn hin væl kenda »GÍ-hugburðin« í Gundadali, har einki er tapt, fyrr enn dómarin hevur bríkslað fyri seinastu ferð.

Kropsliga tóktust teir eisini at hava størri yvirskot enn B36 menninir, tá dysturin var av, og megna teir at seta leikferðina upp á sama støði í teimum seks írestandi dystunum, er einki at ivast í, at mótstøðuliðini fara at køvast, tá komið er nakað út á seinna hálvleik.

Hinvegin er so at siga tað sama galdandi fyri B36, og í løtuni eru tað so teir, so sita í førarasetrinum, soleiðis at teir sjálvir kunnu gera av, hvat gullið skal fara. Treytin fyri hesum er tó, at gøtumenn ikki vinna tey 12 málini, sum B36 nú er betri enn GÍ innaftur.

Verður B36 meistari, er talan samstundis um eitt søguligt meistaraheitið til árstalsfelagið. Við sigrinum í steypakappingini tryggjaðu teir sær nevnliga møguleikan fyri greipuni, sum felagið ongan tíð hevur vunnið áður. Í 1991 var annars heilt nær við, men eftir sigur í steypakappingini restaði eittans mál í at vinna seg fram um unga KÍ liðið, sum tók øll á bóli tað árið.

## Hvat gevur bronsan

Tað er tó ikki bara í Havn og í Gøtu, at spenningurin um meistaraheitið er stórur.

Á Toftum og í Klaksvík er spenningurin eisini minst líka stórur, tí úrslitið av gulltvídystinum verður eisini avgerandi fyri, hvussu verður við europeisku luttøkuni hjá liðnum, sum vinnur sær bronsumerkini. Hesin spenningur kann eisini breiða seg til Vágs ella Klaksvík, men i løtuni eru tað so toftamenn, sum liggja nógv best fyri til bronsumerkini.

Um so er, at verandi støða við B36 sum eittara heldur sær, merkir tað, at GÍ vinnur sær annað UEFA-Cup plássið, meðan KÍ sum tapari av steypafinaluni móti B36 fær seinna UEFA-plássið. Tá verður talan bert um eitt Inter-Toto pláss til bronsuvinnaran, sum allar helst verður B68. Í øllum førum soleiðis sum støðan er nú.

Verður tað hinvegin GÍ, sum fer avstað við meistaraheitinum, vinnur B36 sær rætt til UEFA-Cup sum steypavinnari, meðan triðbesta liðið í landinum somuleiðis vinnur sær rætt til umboðan í UEFA-Cup kappingini. Hetta vil so eisini viðføra, at liðið á fjórða plássinuim vær atgongd til Inter-Toto kappingina, meðan fjórða plássið í sjálvum sær ikki gevur nakra atgongd til Europa, um B36 verður meistari.

Til stuttleikar kann eftir hetta nevnast, at omanfyri standandi hypotesur væl kunnu hugsast at geva nakrar stuttligar støður í teimu dystum, sum enn eru eftir at leika.

Hvussu fara til dømis klaksvíkingar at hugsa, um teir í trið seinasta umfarinum eru á odda 1-0 móti B36. Skulu teir stríðast fyri at halda fast um leiðsluna, samstundis sum teir forkoma egnum møguleika sínum at vinna seg fram til Europa-Cup, ella skulu teir bara lata B36 sleppa við skrekkinum, soleiðis at UEFA-luttøkan fer til Klaksvíkar.

Nakað líknandi kann eisini hugsast um B68, tá teir á næst seinasta leikdegi taka ímóti GÍ. Hvat um toftamenn, sum ikki hava vunnið heimadyst móti GÍ í tíggju ár, tá hava møguleika at basa skurunum, men við at gera hetta samstundis skifta sítt UEFA-Cup atgongumerki um við eina Inter-Toto billet?

Jú, sanniliga eru møguleikarnir nógvir, men hinvegin er so bara at vóna, at bæði leikarar og venjarar eru somikið at sær komin, at hugburðurin altíð verður positivur, tá farið verður á vøllin, og so má mann bara taka restina, sum tað kemur.

## Ongamannalandið

Fyri viku síðani skrivaðu vit, at NSÍ var komið í eitt at kalla ongamannaand, og eftir vikuskiftið tykjast teir nú at hava fingið fylgi av HB í hesum. Hetta kann tó verða broytt, um so er, at HB vinnur útsetta dystin móti GÍ, men soleiðis sum havnarmenninir eru fyri í løtuni, tykist hetta at vera óhugsandi, men sum kunngt er bólturin rundur, og gøtumenn og Johan Nielsen eru neyvan teir, sum kanna sær bitan, áðrenn hann er svølgdur.

Er tað við ringum tannabiti, at HB og NSÍ eru komnir í sonevnda ongamannalandið, so er fagnaðurin á Eiði helst stórur um, at teir nú eisini mugu roknast upp í hendan bóltin. At ein uppflytari mest sum hevur tryggjað sær tilveruna í deildini fimm umfør áðrenn kappingarlok, er í øllum førum ógvuliga sjáldsamt, men í veruleikanum kundi støðan verið enn betri hjá samansett liðnum, ið sum teir einastu hava tapt fyri B71. Vóru seks stig fingin til vega í teimum dystunum, høvdu tey í Sundalagnum og á Eiði helst droymt europeiskar dreymar, men somikið høgt munnu hvørki leikarar ella venjari at hava sett nøsina enn.

## Botnurin óbroyttur

At enda skal eisini nevnast, at botnurin á stigatavluni stendur óbroyttur eftir vikuskiftið, og hóast vágamenn munnu iðra seg um tapið á Mølini, so eru tað tó teir, sum kunnu vera best nøgdir um óbroyttu støðuna.

Hjá sandoyingum er sandurin í tímaglasinum av álvara farin at fjarða, og verður ikki okkurt munagott gjørt heilt skjótt, tykist tilveran í bestu deildini at vera av, tá september mánaður er lokin.

Størstu vónina um stig hava sandoyingar ivaleyst til heimadystin móti HB, sum er alt annað enn væl fyri í løtuni. HB hevur mangan havt tað strævið á Sandi, men hinvegin vóna tey í HB helst, at til ta tíð eru fleiri av skaddu monnunum klárir aftur, soleiðis at uppstillingin í størri mun fer at líkjast henni, sum varð ætlað undan kappingarbyrjan.

Nógvar avgerðir tykjast sostatt longu at vera falnar, men hinvegin eru framvegis fimm umfør eftir, og og ofta stinga óvæntað úrslit seg upp um júst hetta mundi, tá summi lið berjast fyri antin lívinum ella heiðursmerkjum, meðan støðan í fleiri dystum er hon, at mótstøðuenninir einki hava at spæla fyri uttan æruna. Bólturin er framvegis rundur, og allar helst fer hann eisini at rulla fimm umfør afturat.



EB/Streymur-FS Vágar 3-2 (2-0)

# Uppflytararnir tykjast tryggir



*Esmar Eiðisgarð smekkar til, so bólturin fer í málið. Hetta tryggjaði EB/Streymi sigurin á vágamonnum, og ivaleyst var hetta eisini nóg mikið til at tryggja uppflytarunum framhaldandi tilveru í bestu mansdeildini, hóast tað enn resta fimm dystir at spæla*

*Mynd: Sofus Johannesen*

**Við sigrinum á vágamonnum tykjast uppflytararnir úr EB/Streymi at hava tryggjað sær framhaldandi luttøku í bestu deildini komandi kappingarár**

FÓTBÓLTUR

*Jákup Mørk*

Annað vikuskiftið á rað skuldu vágamenn spæla botndyst, tá teir sunnudagin vitjaðu á Eiði, har uppflytararnirr úr EB/Streymi spæla sínar heimadystir.

Eftir sigurin á B71 fyri viku síðani sluppu vágamenn sær av niðasta sessinum, og ivaleyst var tað við vónini um at vinna seg enn longur upp, at farið varð til Eiðis, har ein sigur kundi innibera, at liðið eisini lyfti seg upp um dystin um upp- og niðurflyting.

## Lág ferð

Tá vágamenn vunnu dystin á B71 var fremsta vápnið í so máta stríðsfúsni hugburðurin, sum leikararnir høvdu við sær á vøllin, men hesin tóktist at liggja eftir har vesturi sunnudagin.

Leikferðin fyrstu trý korterini var ógvuliga lág, og komst hetta eina mest av, at liðini bæði at kalla bert bíðaðu eftir hvørjum, soleiðis at tey heldur vildu sleppa at spæla kontrafótbólt. Av tí sama vórðu liðini eisini varin, tá farið varð í álop. Nógvir mans vórðu hildnir aftan fyri bóltin, og yvirhøvur var talan um sera fáar málmøguleikar.

Gestirnir vóru tó sera blíðir móti vertunum, tí eftir á leið eitt korter, fekk Sorin Anghel eina gávu av teimum heilt stóru. Jógvan Hendrik Samuelsen og Jákup Joensen misskiltu hvønn annan í eini at síggja til vandaleysari støðu, og rumenski álopsmaðurin hjá EB/Streymi er ikki spælarin, sum letur eitt tílíkt tilboð fara framvið, og tað gjørdi hann so heldur ikki hesa ferð.

Hetta betraði sum vera man enn meira um fyritreytirnar hjá heimaliðnum at dúva upp á kontraálopini. Vágamenn vórðu noyddir at flyta seg longur niðan á vøllin, men hóast hetta, so eydnaðist sjáldan at seta gongd á nakað veruligt álop. Spælið gekk alt ov seint niðan eftir vøllinum, so verjurnar høvdu tíð at skipa seg, og ógvuliga sigandi skuldi eiini ein deyðbóltur til, áðrenn heimaliðið fekk økt um leiðsluna.

Fríspark varð sent innfyri, og har var Andrzej Pacek hægstur, soleiðis at hann kundi gera sítt næsta fyrstudeildarmál í føroyskum fótbólti. Hitt fyrsta gjørdi hann, tá hann í fyrsta dystinum fyri KÍ í 1999 skoraði móti B68.

## Vendu dystinum

Høvdu vágamenn verið dølskir í fyrra hálvleiki, so var tað kanska fyri at goyma orku til seinna hálvleik, tí í øllum førum komu teir út sum eitt óløgi, tá farið varð í holt við seinna umfarið.

Kanska loypti hetta eisini hvøkk á vertirnar, sum allar helst hildu seg hava tryggjað sær stigini, go tað gingu heldur ikki meira enn tíggju minuttir, so stóð aftur á jøvnum.

Aftur var upprunin til málið eitt fríspark. Sparkað varð langt fram eftir vølinum, har Jákup Joensen longdi fríspark inn um verjuna. Vladlens Osipovs gjørdist púra leysur, og hóast skotroyndin var meira enn hálvkiksað, so varð endin tann, at bólturin rullaði í málið.

Bert fimm minuttir seinni tók Tór-Ingar Akselsen, sum júst er komin aftur til landið, málið í egnar hendur. Eftir at hava runnið ein djúpan bólt upp, sneiddi hann ein verjuleikarar av sær, áðrenn hann við einum skrúvandi skotið sendi bóltin upp í handara málhorn av brotsteigarmarkinum.

## Esmar átti trumfin

Leingi sá nú út til, at javnleikur skuldi gerast endaliga úrslitið, men mest sum liðini høvdu sligið seg til tols við hesum, langaði Esmar Eiðisgarð seinasta trumfin á borðið.

Ein bóltur varð sendir inn fyri vágamálið, og í fyrstu atløgu tóktist vandin ikki so stórur. Stútað varð útfrá, men tá bólturin kom niður, smekkað Esmar til, og uttan nakran møguleika hjá Arturas Ramoskas streyk bólturin í málið.

Málið tryggjaði EB-/Streymi sigurin á kappingarneytunum í botninum, og allar helst tryggjaði hetta eisini liðnum framhaldandi tilveruna í bestu mansdeildini. Í øllum førum er sera ilt at ímynda sær, at teir skulu missa fimm stiga-leiðsluna niður til FS Vágar, og at hetta er hent longu fimm umfør undan kappingarloki kann ikki sigast vera annað enn imponerandi av einum uppflytara.

Vágamenn mugu hinvegin helst sláa seg til tols við, at teir aftur í ár skulu spæla móti einum aðru deildarliðið um rættin til at verða í bestu deildini komandi kappingarár.

Heilt tryggar kunnu teir tó ikki kenna seg, og tí eiga teir at leggja alla orku í at vinna sær í øllum førum eitt stig komandi dystirnar. Megna teir tað, er lítið at ivast í, at málið fyri kappingarárið er rokkið.

**EB/Streymur-FS Vágar 3-2 (2-0)**

1-0: Sorin Anghel 16
2-0: Andrzej Pacek 45
2-1: Vlad Osipov 50
2-2: Tór-Ingar Akselsen 56
3-2: Esmar Eiðisgarð 87

**Dómari:** Birgir Sondum (B36)

**EB/Streymur:** Gunnar á Steig - Ólavur Poulsen, Andrzej Pacek, Alfred Jacobsen, Andreas J. Dahl, Esmar Eiðisgarð, Ronnie Samuelsen, Eyðfinnur Joensen, Christian Carlsson - Sorin Anghel, Jón Sigurð Gleðisheygg

**FS Vágar:** Arturas Ramoskas – Jákup Joensen, Jógvan Hendrik Samuelsen, Jack Johansen – Ruslan Ruslan Screlea, Hannus Olsen, Jón Nielsen, Vladlens Osipov – Tór-Ingar Akselsen, Sonni Johansen, Birgir Joensen